Tveir løgreglubilar vóru gjøgnumholaðir av kúlum. Yvir 30 kúlur raktu hendan bilin

Skutu við skørpum eftir fólki

Trý fólk fingu smærri snuddir, tá fýra ungir dreingir skutu frá hond við riflum sunnukvøldið. Tilburðurin, sum fór fram á Brekku í Klaksvík, fekk løgregluna at brynja seg við skotvápnum og skottryggum vestum

(KLAKSVÍK) Skotini dundu, kúlurnar flugu gjøgnum luftina, og millum soraðar politibilar og brotin húsavindeygu var tað eitt undur, at einki fólk varð rakt av kúlunum, tá fýra unglingar gingu berserkagongd við riflum í Klaksvík sunnukvøldið.

Tveir politibilar vóru gjøgnumgataðir av kúlum, fleiri húsavindeygu í grannalagnum vórðu rakt av kúlum, og skotið varð eisini eftir løgreglumonnum og øðrum fólki.

Trý fólk fingu smærri snuddir, men tað var um reppið, at onkur varð raktur av kúlunum. Tvey fólk kláraðu í seinastu løtu at flyta seg undan skoti, tá dreingirnir skutu í vindeyguni hjá teimum, og hesi fólkini vórðu rakt av glasbrotum.

Ein kona, sum kom koyrandi fram við í einum bili, fekk snudd í lærið, tá ein av dreingjunum skjeyt inn í førarahurðina. Kúlan streyk fram við konuni og inn í girkassan.

Konan, sum ikki varð greið yvir, hvat varð hent, steðgaði bilinum og fór út at hyggja eftir hurðini, og tá varð aftur skotið eftir henni. Hon slapp sær til rýmingar og slapp undan kúlunum, men hon noyddist á skaðastovuna, tí hon hevði fingið brot frá hurðini inn í lærið.

Skutu eftir løgregluni

Fólk í umráðnum vóru skelkað av hendingini, og meðan skotini rungaðu, rýmdu grannarnir á dyr fyri at leita sær skjól.

Ein av grannunum var ávegis til húsa, meðan skottilburðurin fór fram, men tá hann sá, hvussu støðan var, leitaði hann sær skjól og fór at ringja til onnur fólk í umráðnum fyri at ávara tey.

Løgreglan kom á staðið um hálvgum nýggju tíðina, men tá løgreglumenninir komu á dyr á húsunum, har dreingirnir vóru staddir, vórðu teir bidnir um sleppa sær avstað, og síðani fóru dreingirnir at skjóta eftir teimum.

Løgreglumenninir vórðu noyddir at flýggja og leita sær skjól nærindis. Løgreglubilarnar vórðu síðani gjøgnumskotnir. Rútar, dekk og hurðar vórðu skotin, og annar av løgreglubilunum hevði hol eftir fleiri enn 30 kúlur.

Løgreglumenninir bóðu síðani um styrk, og trý løgreglufólk komu á staðið aftur at. Løgreglufólkini brynjaðu seg við skotvápnum og skottryggum vestum, men løgreglan lat einki skot av.

Teir royndu at tosa dreingirnar til rættis, og tað eydnaðist, at fáa dreingirnar at leggja vápnini. Dreingirnir royndu at sleppa sær til rýmingar. Tríggir teirra flýddu oman móti býnum, men fólk, sum var á staðnum, helt eftir teimum. Dreingirnir vórðu fangaðir, og løtu seinni hevði løgreglan eisini fingið fatur á fjórða dreinginum.

Teir vórðu allir fluttir á løgreglustøðina, har teir vórðu avhoyrdir sunnukvøldið og mánanáttina.

Kúlurnar fóru ígjøgnum bilarnar

Undir skottilburðinum fjaldi eitt av løgreglufólkunum seg undir vegginum á einum grannahúsi, og í hesum veggi standa í dag greið boð um, at skotið var eftir hesum løgreglumanni. Stór hol eru í vegginum eftir skotinum frá kraftmiklu vápnunum.

At talan var um ógvuslig vápn sást millum annað av, at kúlurnar fóru inn í aðari síðuni av løgreglubilunum og útaftur hinumegin.

Dreingirnir skutu eisini eftir Sjómansheiminum, sum liggur einar 400 metrar frá húsunum, har teir vóru staddir. Ein rútur varð skotin inn á kamarinum hjá fyristøðufólkunum, og glasbrot sløddust um alt kamarið, har eingin tíbetur staddur, tá kúlan kom og sendandi gjøgnum rútin.

Eisini varð skotið oman í býin, men eingin varð raktur av hesum kúlum. Løgreglan ráddi fólki, sum koyrdi í býnum, um at sleppa sær til húsa.

Ólógligar riflur

Dreingirnir høvdu fingið fatur á vápnum og lóðri inn hjá skyldmanni hjá einum av dreingjunum. Hesin maðurin varð burturstaddur sunnudagin, og unglingarnir vóru farnir inn í húsini, haðani teir skutu við skørpum.

Tá løgreglan kom á staðið kókaði rættiliga yvir, tí tá fóru dreingirnir at skjóta eftir fólki, bilum og húsum. Bara smávegis fólkskaði hendi undir skottilburðinum, sum samanlagt í einar tveir tímar, men tað var meira eydnan enn skilið sum gjørdi, at eingin varð niðurskotin.

Løgreglan vil ikki upplýsa, hvørji og hvussu nógv vápn dreingirnir høvdu, men talan er um kraftmiklar riflur, sum ikki eru loyvdar í Føroyum. Løgreglan váttar eisini, at nógv lóðar var í húsunum, og eftir skottilburðin lógu patrónhylki og sløddust kring húsini.

Teir fýra dreingirnir eru allir undir 15 ár, og tí kunnu teir ikki rættarfylgjast. Løgreglan, sum heldur fram at kanna málið, hevur latið Barnaverndini og sosialu myndugleikunum í Klaksvík málið.

Barnaverndin var við til forhoyrini eftir tilburðin, og í gjár fundaðust tey um málið. Formaðurin í Barnaverndini vildi ikki gera viðmerkingar, tá vit tosaðu við hana á middegi í gjár.

Niðan fyri vegin var ein kúla farin ígjøgnum eitt kamarsvindeyga og endaði í vegginum oman fyri bamsuna

Hanus Lassen við blóddálkaðari skjúrtu framman fyri køksvindeygað. Tvey skot vórðu latin av eftir Hanusi sum hann stóð framman fyri vindeygað. Men lukku tíð kláraði hann at leypa undan

Hanus leyp undan kúluni

Tá Hanus Lassen fór í køksvindeygað fyri at vita, hvat var áfatt uttanfyri, vendi ein av dreingjunum rifluni ímóti honum og skjeyt

(KLAKSVÍK) Hanus Lassen og familjan hjá honum fingu ein kvøkk fyri lívið, tá dreingirnir, sum gjørdu um seg á Brekku í Klaksvík sunnukvøldið, skutu við riflu inn í køksvindeygað hjá teimum.

- Eg hoyrdi skot uttanfyri og fór í køksvindeygað fyri at vita, hvat var áfatt. Tá sá ein av dreingjunum meg, og hann vendi rifluni beint ímóti mær. Eg leyp úr vindeyganum, men tá small eitt skot, og ein kúla kom sendandi inn gjøgnum køksrútin, greiðir Hanus Lassen frá.

- Eg fekk glassplintur í kjálkan og bløddi eitt sindur, men annars fekk ongan skaða, sigur hann.

Smábørn í køksvindeyganum

Knappir tveir tímar eru farnir síðani tilburðin, og Hanus stendur í køkinum og greiðir frá hendingini. Hann hevur eitt plástur á kjálkanum, har glasbrot raktu hann. Skjúrtan og slipsið eru blóddálkað, og bæði í køkinum og í stovuni síggjast slóðirnar eftir kúlurnar, sum vórðu sendar inn í húsini.

- Vit høvdu tvey smábørn í húsinum, og tey høvdu staðið frammanfyri køksvindeygað stutt frammanundan, sigur hann.

Konan var eisini í húsunum, tá fyrsta kúlan kom gjøgnum køksrútin.

- Tá fyrsta skotið kom, leyp eg inn í stovuna at goyma meg, og síðani rýmdu vit úr húsunum, greiðir kona Hanus, Elin, frá.

Stutt aftaná skjeyt ein av dreingjunum enn eitt skot inn gjøgnum køksvindeygað, men hesa ferð fekk eingin skaða av kúluni. Fimm fólk vóru í húsunum, tá fyrsta skotið varð vent móti køksvindeyganum, men tey rýmdu øll á dyr eftir hendingina.

Tvørtur ígjøgnum húsini

Í køkinum liggja glasbrot á gólvinum. Tvey rund hol eru í køksvindeyganum, og í stovuni hava kúlurnar gjørt nakað av skaða. Barometrið er dottið á gólvið, stovuborðið hevur fingið eina skeinu av einari kúlu, sum síðani fór ígjøgnum ein rút í stovuhurðini og upp undir loftið.

Eisini á á loftinum hava dreingirnir skotið eina kúlu ígjøgnum vesivindeygað, men har var eingin serligur skaði hendur.

Í køksvegginum er prógv um, at talan var um serlig projektil, tí har kúlan er farin inn er eitt lítið runt hol, og hinumegin veggin - inni í stovuni - er eitt stórt hol, har kúlan er farin útaftur, og síðani hevur hildið leiðina tvørtur ígjøgnum húsini.

- Hetta er óhugaligt. Eg hevði aldri væntað, at slíkt skuldi fara henda her, sigur Hanus Lassen.

Hann og familjan fór innaftur til sín sjálvs, eftir at løgreglan hevði handtikið teir fýra dreingirnar. Telefonin ringdi alla tíðina, og allan vegin gjøgnum húsið sóust slóðirnar eftir deyðiligu kúlurnar, sum tíbetur ikki raktu nakað fólk í húsinum.

Sosialurin í Klaksvík

Orð: Eyðun Klakstein og Fróði Løkságarð
Myndir: Eyðun Klakstein, Fróði Løkságarð og Bárður Klakstein